

**TINGHELLAN**



# Eplatallerkar og felags politisk mentan

**Jóan Pauli Joensen hevur leingi staðið á Tinghelluni og eygleitt politisku mentanina. Sum formaður í grundlógarnevndini hevur sum fáur fingið høvið at fylgt við í politisku tilgongdini. Jóan Pauli hugleiðir á Tinghelluni í dag um ovastu lógina og politiska mentan**



– *Tað tykist, sum um allir flokkara halda, at tað er skilagott at fáa eina evstulóg fyri Føroyar, men øllum dámar ikki heitið grundlóg. Henda lóg eitur í øllum førum »constitution« á enskum, sigur Jóan Pauli Jonesen m. a. i Tinghelluni í dag*

TINGHELLAN
*Jóan Pauli Joensen*

Ein dag á áhugaverdu ferðini hjá grundlógarnevndini í USA sótu fólk til borðs og fingu sær ein bita til døgurða. Tá sigur ein av nevndarlimunum - eg haldi tað var Eyðun Viderø - at hann visti ongantíð, um tað var rætt at taka bakaða eplið, sum lá á lítla tallerkinum høgrumegin ella tað á tallerkinum vinstrumegin. Nú tá málið varð reist í hesum forum, varð avgerð tikin um, at tað var rætt at eta tað eplið, sum lá til høgru. Harvið hevði okkara lítla »samfelag« tikið sína støðu. »Nú er tað rætt, tí vit hava avgjørt tað,« segði Eyðun tá og sipaði harvið til kjakið hjá okkum stutt áðrenn um at velja og vraka í stjórnarskipanini.

Tað kundi sjálvandi verið eins rætt at gjørt av, at tað var rætt at eta tað eplið, sum lá til vinstru. Men tóku vit onga støðu í okkara lítlu skipan, kom ólag á. Við hvørt er neyðugt við greiðum reglum, men mangir eru mátanir. Soleiðis er tað eisini við eini grundlóg.

Tað er ikki so nógv hent í sjálvum grundlógararbeiðinum síðani formaðurin lat landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum frágreiðingina gamlaárskvøld 2001, og frágreiðingin fyrst í 2002 var løgfrøðiliga kannað og rættað og løgd út á netið í mars 2002.

## Fullveldi ella fleirnýtt lóg

Endamálið var tá at gera eina grundlóg fyri fullveldið Føroyar. Tað var grundarlagið undir øllum. Men leiðin til fullveldið, hon bara longdist. Hóast arbeiðið í grundlógini gekk sera væl yvirhøvur, serliga ta fyrstu tíðina, so kom tað at verða ein snávingarsteinur í arbeiðinum, at grundlógin skuldi vera fyri eitt fullveldi. Hetta var tað, sum gjørdi, at arbeiðið mestsum steðgaði í september 2001. Høvdu vit longu tá stevnt móti eini meira fleirnýttari grundlóg, høvdu vit óivað komið á mál.

Ein spurningur, sum ofta stakk seg upp, var um tað bar til at hava eina grundlóg í einum landi, sum ikki hevði fullveldi. "Vit hava jú eina grundlóg" var ofta sagt, "Danmarks riges grundlov er okkara grundlóg". Hetta er fyri so vítt púra beint, men tað tyktist ikki at verða nakað, sum forðaði fyri, at vit harumframt høvdu eina grundlóg fyri landið Føroyar. Henda lóg kundi so verða ein evstalóg fyri øll føroysk viðurskifti. Men so leingi, sum Føroyar eru partar av danska ríkinum, er Danmarks Riges Grundlov sjálvsagt tann hægra lógin.

Hetta nýtist ikki tann heilt stóri lógarkunnleikin til.

Fáa Føroyar hinvegin fullveldi, so vildi grundlógin verið har, kanska onkur smávegis broyting í onkrum paragraffi. Tað hevði óivað eisini borið til at samrátt seg fram til onkra millumloysn í viðurskiftunum millum Føroya og Danmarkar. Hetta eru spurningar sum óivað kunnu loysast politiskt og við lóg.

## Hvussu skal lógin eita?

Tað tykist, sum um allir flokkar halda, at tað er skilagott at fáa eina evstulóg fyri Føroyar, men øllum dámar ikki heitið grundlóg. Henda lóg eitur í øllum førum "constitution" á enskum. Undan fólkaatkvøðuni í 1946 høvdu føroyngar eina stjórnaskrá til reiðar og tað nærmasta, sum vit í dag hava eini føroyskari grundlóg er stýrisskipanarlógin. Onkur heldur, at vit kundu nýtt orðið Føroya Lóg ella Evstalóg. Persónliga meini eg ikki, at tað hevur nakran størri týdning, hvussu barnið eitur, tað sum hevur týdning er, at Føroya Fólk viðurkennir barnið sum sítt, og at vit eru góð við tað.

Tað eru tey, sum halda, at tað gongur ov leingi við at fáa skrivað eina grundlóg. Tað er einki at ivast í, at tað hevði borið til at fingið eitt upprit til eina føroyska evstulóg eftur kanska tveimum vikum. Víst verður ofta á, hvussu skjótt amerikumenn fingu sína konstitutión, men tá vóru eisini tey frægastu høvdini savnað saman í tríggjar mánaðir. Harumframt var nógv tosað um konstitutionellar spurningar áðrenn. Spurningurin var viðgjørdur millum fremstu umboðsmenn fólksins frammanundan

## Grundleggjandi lóg

Jákup Thorsteinsson segði í einum fyrilestri um bókina Færøsk Politik hjá Jóannes Patursson, sum hann helt á Landsbókasavninum, at Jóannes Patursson var tann fyrsti, sum nakrantíð hevði reist spurningin um donsku grundlógina og Føroyar. Tað hevði verið tøgn um henda spurning áðrenn. Her er tann munur á íslendingum og føroyingum, at ikki bert høvdu íslendingar fleiri lærd fólk í høgum størvi í umsitingini í Danmark og sum lærarar og professarar á Universitetinum í Keypmannahavn, men tað vóru eisini hópurin av juridiskum kandidatum í Íslandi. Haraftuat fingu teir rættiliga skjótt sín egna lógskúla, sum gjørdi teir nógv betri skikkaðar til at taka sær av slíkum málum enn føroyingar. Har var ein størri áhugi í fólkinum sum heild fyri slíkum málum, tí tey lógkønu vóru jú partar av fólkinum og gjørdu sína ávirkan galdandi.

Hetta verður ikki sagt fyri at lasta føroyingar, sum til allar tíðir hava verið eitt menta fólk, men føroyska mentanin hevur ligið í teirri einstøku bygdini. Tað er ikki fyrr enn seinni, vit av álvara eru komin at síggja okkum sum eitt land og eitt fólk. Kanska bilar tað í summum førum enn. Vit høvdu okkara fólksliga almenni, og tað er ikki rættiliga, fyrr enn vit fingu fríhandil, og at tingið var endurreist, at politisk kjak av álvara fór at taka seg upp í Føroyum.

## Felags mentan

Í fyrstuni var eg sum grundlógarnevndarformaður í so bráður, vildi hava eitt uppskot greitt longu til jóla 1999. Men eg skuldi gerast klókari! Tí at skapa eina grundlóg er ein prosess - ein gongd, sum tvinnir saman ein tráð av fatan um tað grundleggjani í samfelagsskipanini og samfelagsvirðunum í ikki bert politikararnar, men í alt fólkið. Tað er neyðugt at tvinna ella sjóða saman eina felags mentan á hesum øki. Tað tekur tíð. Tað er eisini vorðið rættiliga greitt undir grundlógararbeiðinum, at stýrisskipanarlógin ikki rættiliga er komin undir húðina á teimum, sum vara av henni, og uppaftur minni hjá fólki flest.

Hon fekk helst ikki ta neyðugu viðgerðina. Tað er helst tí, at vit í nógvum førum hava fingið grátandi politikarar, sum hava ilt við at skilja framferðina móti teimum, og aðrar, sum í veikleikans treiskni tvíhalda um, at teir hava einki skeivt gjørt.

Ein ráðharri er ikki bert ein persónur við makt, men hann er eisini ein myndugleiki, sum er ítøkiliggjørdur í einum ráðið - einum ministerium - har embætismenn og starvsfólk eru greinar á sama viðarbuli. Her má vera ein mentan til staðar, sum á onkran hátt samansjóðar áhald - kontinuitet - og nýggjar kolveltandi avgerðir, so tað verður til skynsaman politikk.

## Fólkið fremst

Tað var spell, at grundlógarnevndin ikki rættiliga fekk skipað fyri einum breiðum fólksligum orðaskifti. Tað verður tað vónandi til við tí nýggja grundlógaruppskotinum.

Meðan vit bíða eftir hesum, halda vit so eina grundlógarráðstevnu við hesum høvuðstættum:

1. Grundlógartilgongd faklig ella fólkslig
2. Grundlógarmátar - skjøl og skipan
3. Fortreytir - ríkisstøða og fullveldi
4. Framhald - stovnan og stevnumið
5. Føroysk stjórnarlóg - neyðug og nýtilig

Umframt at verða viðgjørd í fyrilestrum verða hesi evni eisini viðgjørd á verkstovum. Hetta er ein faklig byrjan sum fyrireikararnir hava sett stórar vónir til. Stevnan fer fram meðan ikki sørt av politiskum rumbli er í landi okkara. Kanska vil stevnan, um illa vil til, fara fram meðan Føroyar liggja í stjórnarloysi.

Hetta lærir okkum bert tað, at tað er avgjørt neyðugt við eini grundlóg og eini politiskari mentan ið byggir á felags virðir á tí politiska leikvøllinum. Vit mugu kveita til báðar síður og velja, hvør eigur hvat politiskt epli, so skipanin er greið, og øll hava skilt hana.



**KJAK**



# Føroyar, eitt valdømi

**kommunusamanlegging og tveykamarskipan**

**Bogi Eliasen**
*B.A. Scient.Pol,*
*bgls@get2net.dk*

Millum ár og dag hevur nógv verið kjakast um, hvørt tað er neyðugt við kommunusamanlegging til størri kommunur ,og eitt valdømi hevði verið rættast til løgtingsval. Greinaskrivarin hevur skrivað eitt kjakinnlegg til grundlógarráðstevnuna í komandi viku, um hví og hvussu hesar broytingar kunnu ella skulu fremjast og at broytingarnar helst skula fremjast saman. Hetta er ein stytri grein um innihaldið í innlegginum

Undirritaði heldur tað verða alneyðugt fyri tað føroyska samfelagið, at løgtingsval verður í einum landsumfatandi valdømi, og at vit fáa størri og sterkari kommunur, altso kommunusamanlegging, sum kunna taka størri ábyrgd.

Hví?

Føroyar er eitt lítið samfelag við umleið 48.000 íbúgvum og 48 kommunum. Kommunubygnaðurin er frá eini tíð, tá Føroyar hvørki hevði eitt politiskt samfelag, samferðslukerv ella samskiftismiðlar, sum í dag. Fyrr hevur verið náttúrligt at býtt upp í hesar eindir, meðan samfelagsmenningin ger, at tað ikki er besta loysnin longur. Fleiri av kommunum í Føroyum eru so smáar, at tær í veruleikanum ikki klára at loysa uppgávur. Harafturat er ein stórur partur av teimum ov smáar til at fáa størri uppgávur at umsita, sum partur av økismenning. Tí elvir núverandi kommunalbygnaðurin ikki til nærdemokrati, økismenning ella miðspjaðing, men hinvegin til miðsavnan. Hetta, tí kommunurnar ikki eru førar fyri at taka størri uppgávur á seg, sum miðfyrisitingin so má taka sær av í staðin.

Størri og sterkari kommunur verða harafturímóti við til at styrkja nærdemokratiið og harvið verður tað ein miðspjaðing og økismenning. Trupuleikin er eisini, at núverandi kommunuskipanin hevur dupulta fyrisiting við sær, tí tær smáu kommunurnar ikki klára at umsita økir, sum tær størru hava. Í einum so lítlum samfelagi, sum okkara, er alneyðugt ikki at hava dupulta umsiting og tí verður neyðugt at hava størri kommunur, sum kunnu taka sær av teimum somu málsøkjunum, soleiðis at miðfyrisitingin ikki eisini skal umsita mál, sum eru løgd til kommunurnar.

Undirritaði heldur ikki, at núverandi valskipan við sjey valdømum er besta loysnin. Hendan skipanin ger, at landið verður býtt í 7 áhugabólkar, sum tingsins kosnu skula røkja. Tað ger, at tað ikki nóg ofta verður hugsað landspolitiskt, og kanska ov ofta hugsað lokalpolitiskt í Løgtinginum. Lokalpolitikkur skal vera í einum demokratiskum samfelagi. Men eftir mínum tykki hevði tað verið betri at flutt lokalpolitikin har, sum hann eigur at vera, nevniliga hjá størru og sterkaru kommunum. Fyrimunurin við einum valdømi er, at hetta sum frá líður ger, at Føroyar gerst eitt samfelag heldur enn sjey lokalsamfeløg sum ídag.

Eg eri fullvitandi um, at nógv so hugsa, at útjaðarøkini missa ávirkan, og at tær smærru kommunurnar vilja verða etnar av teimum størru. Men støðan er, at 2/3 av fólkinum býr uttan fyri Tórshavn og tí eisini fara at hava nógv fleiri atkvøður enn høvuðsstaðurin. Í einum landsvaldømi, kunnu tey velja millum allar politikarar, sum tey halda føra teirra politik, so tey fáa betur møguleika at velja betri umboð fyri teirra søk.

Harumframt hevur skipanin við sjey valdømum ein demokratiskan trupulleika, tí at dýrastu løgtingsumboðini kunnu kosta nærum tvær ferðir so nógv, sum tey bíligastu. Hesum trupulleika slepst undan við einum valøki. Valúrslitið gerst soleiðis rættvísari, tí flokkarnir fáa umboð beint eftir atkvøðutali og uttan fløkjur av valøki og eykalimum



*Bogi Eliasen er serritaskrivandi ráðgevi í stats-og fólkarættarliga kanningarbólkinum, settur av Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi*

Viðvíkjandi kommunum kann sigast, at bygnaðurin í dag ger, at miðspjaðing ikki er møgulig, tí kommnurnar eru ov smáar til at taka størri uppgávur. So um útjaðaraøkini veruliga vilja hava miðspjaðing og økismenning, so er alneyðugt við kommunusamanlegging.

## Økisumboðan - eitt ráðgevandi 2. kamar

Men undiritaði metir, at mest fæst burtúr hesum broytingum, um tær verða samskipaðar. Soleiðis at eitt landsvaldømi verður styðjað av og fær mótspæl frá størru og sterkaru kommunum. Men fyri at fáa hesa skipan at virka enn betur, og at hon skal fáa legitimitet frá útjaðaranum, er eitt hugskot at gera eina tveykamarskipan, soleiðis at fyrsta kamarið, løgtingið, verður valt í einum landsvaldømi, meðan ráðgevandi 2. kamari verður í tí, sum ídag eru valøkini. Hetta bæði fyri at útjaðaraøkini skulu hava eina beinleiðis atgongd til tingið. Men eisini soleiðis, at alt landið og fólkið hevur álit á hesi broyting, tí demokrati byggir júst á fólksins álit. Soleiðis verður ráðgevandi annaðkamarið umboð fyri økini í einari nýggjari skipan, har lóggevandi løgtingið sum fyrsta kamar verður valt í einum valøki, ráðgevandi annaðkamarið verður valt í kanska núverandi valøkjunum ella hvat fer at verða tær størru kommunurnar. Kommunurnar fara at taka lut í eini veruligari miðspjaðing og økismenning, har tær fáa fleiri og størri málsøkir at umsita, og soleiðis fáa vit eitt betri nærdemokrati.

Fyrimunirnir við eina slíkari broyting er, at Løgtingið skal hugsa um landspolitik, meðan ráðgevandi annaðkamarið og størru og sterkaru kommunurnar føra lokalpolitik.

## Uppskotið

Eitt valdømi, 7-9 stórar kommunur og ráðgevandi Økiskamar.

Bygnaðarbroytingarnar við einari kommunusammanlegging, soleiðis at vit fáa 7-9 kommunur: kommunurnar fáa meiri ábyrgd og betri nærdemokrati. Samstundis verður løgtingsval í einum landsumfatandi valdømi. Hetta hevur við sær, at landspolitikkur verður í Løgtinginum og lokalpolitikkur har hann hoyrir heima, hjá kommununum. Men fyri at fáa javnvág og tryggleika í broytingina, verður eitt ráðgevandi annaðkamar sett á stovn, Økiskamarið, sum verður valt við t.d. einum umboðið fyri tað, sum ídag eru valøkini, ella eftir týskari fyrimynd, at hvør kommuna velur eitt umboð í økiskamarið.

Økiskamarið skal vera ráðgevandi, sum, um meirilutið er í Økiskamarinum fyri tí, skal kunna krevja, at eitt av løgtinginum samtykt lógaruppskot skal beinast aftur fyri tingið, kallað fjórða viðgerð. Økiskamarið skal hava rætt at seta fram lógaruppskot, men ikki hava beinleiðis sýtingarrætt. Limirnir skulu kunna luttaka í løgtingsnevndum eftir ynski. Soleiðis varðveita økini sína beinleiðis atgongd til tingið, lokalpolitikkurin verður fluttur til kommunurnar og økiskamarið, sum elvir til betri nærdemokrati, miðspjaðing og økismenning, tí kommunurnar fáa førleika at yvirtaka størri málsøkir.

Av peningaligum ávum er neyðugt, at talið av løgtingslimum verður lækkað við í minsta lagi so nógvum limum, sum Økiskamarið fer at hava. Soleiðis fer løgtingið at hava millum 20 og 25 limir og Økiskamarið millum 7 og 9.